

Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi og Malan Ellefsen frá Vinnumálaráðnum marknaðarføra oljuletingina við Føroyar í 2017 á oljumessuni í Aberdeen. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Vísa vegin til oljuleiting við Føroyar í 2017

**Jan Müller**

10.09.2015 - 15:24

Oljan.fo

Tað er altíð skilagott vera úti um seg í góðari tíð tvs. at kunna alment um tær ætlanir, sum liggja fyri framman. Og júst hetta er ein av boðskapunum á føroyska básinum á altjóða oljumessuni, tá stjórin á Jarðfeingi, Petur Joensen og Malan Ellefsen frá Vinnumálaráðnum, royna at greiða vitjandi frá um komandi oljuútbjóðingina á føroyska landgrunninum um tvey ár.

Tvær reisir um dagin heldur Petur Joensen eina sera áhugaverda og upplýsandi framløgu á básinum, har greitt verður frá um føroysku oljuframtíðina, men har hann eisini sigur frá tí, sum longu er hent. Hóast 9 brunnar eru boraðir og einki lønandi fund enn gjørt, so ivast oljustjórin ikki í, at oljan goymir seg í føroysku undirgrundini. Og hann dylur ikki fyri, at oljufeløgini veruliga kunnu skora í Føroyum, um tey vilja gera íløgur her.

Føroyska undirgrundin er “underexplored”, sum Jarðfeingisstjórin orðar seg og vendir sær móti teimum vitjandi við boðskapinum um, at nýggj leitiloyvi verða latin oljufeløgunum um tvey ár. Hann vísti eisini á, at myndugleikarnir hava skapt sera góðar karmar fyri oljufeløgini at leita eftir olju og gassi. Nú verður so arbeitt við at gera ta 4. útbjóðingina klára og verður eisini arbeitt við at hyggja at kørmunum, um teir kunnu gerast uppaftur betri.

Undir framløguni vísti hann kort yvir føroyska leitiøkið, har danska oljufelagið DONG er einasta oljufelag, sum hevur leitiloyvi.





